TIL SØLU
Eitt Sega Mega Drive til sølu við 5 spølum. Harav 6 eru í einum – alt fyri bert kr. 1.500. (2 joystick)
Tlf. 15907, eftir kl. 17

TELDUSPØL TIL SØLU
Try spøl til sølu fyri 300 kr. stk. Max, Z og Black Out.
Tlf. 19700

PRINTARI TIL SØLU
Canon BJ-4000 lit og svart/hvitt printari til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 22518, eftir kl. 17

TELDA TIL SØLU
Pentium 90 MHz, 32 MB Ram, 500 MB Harddisk, 6xCD-Rom, Diamond Stealth Grafikkort, Sound Blaster ljóðkort, Windows 95 + Office 95, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 22518, eftir kl. 17

TIL SØLU
Tape-backup til sølu við 15 bondum. Vælegnað at goyma programm og data við.
Tlf. 14421

TELDA TIL SØLU
* Pentium 166 MHz
* 48 Mb RAM
* 12x CD-ROM
* 2GB harddisk
* Samsung 15Gli skerm
* 3D-Skermkort
* Fax/Modem
* Nogv góð programm sum t.d. Windows95, Ms-Office 97 PRO, AutoCad-13, Corel 4
* Spøl kunnu fylgja við.

Til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 17595, eftir kl. 17

Tónleikur

HEIMASTUDIO
Fostex R8, 8-sporaður spolabandupptakari við fjarstýring og spølum til sølu.
Tlf. 55973

GITTARI TIL SØLU
Ein Washburn MG40 við einum Roland 10 W forsterkara og einari Boss Heavy Metal 2 pedal til sølu. Prísuppskot 4.000 kr.
Tlf. 19515

SANGKÓRIÐ RØDDIR
byrjar venjingarnar aftur tórskvøldið 22. jan. kl. 19.30. Øll eru vælkomin.
Nevndin

P.A. ANLEGG TIL SØLU
Yamaha E14X 200 mixpult 12 kanalir 2 stk. H.H. hátalarar á 300 W, 2 stk. 500 W. Ein monitor Carlsbro. Mikrofonstativir og kassi til leiðningar
Tlf. 24703

GUITARFORSTERKARI
Marshall Top og Cabinet, 3 ára gamalt. Top: Valvestate 100 V modell 8100. Cabinet: Lead 4x12" 140 W, model 8412, lítið brúkt, til sølu fyri 4.500 kr. Nýprísur 11.000 kr.
Tlf. 24703

TIL SØLU
Eitt Samsung stereoanlegg v/ 2 bandupptakarum og plátuspælara til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 13424

TIL SØLU
Ein Philips 50 W guitarforsterkari til sølu fyri 1.500 kr. Nýprísur 4.000 kr.
Tlf. 14384

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
28" Philips sjónvarp til sølu
Tlf. 71659

Ymiskt

ROKKJALLARIN
Vit átaka okkum at selja fyri fólk.
Eisini keypa vit deyðsbúgv.

ROKKJALLARIN
Tlf. 11990 & 83390
Tinghusvegur 42 100 Tórshavn
Opið: mánad.-friggjad. kl. 13–17.30
Leygardag: eftir avtalu

Sp/f D S Johannessen FR-700 Klaksvík
Fiskireiðskapur:
Traður, pilkar, nylon o.m.a.
Fartelefon útbúnaður
Taskur, løðitól o.m.a.
Tlf. 57937 - Fax 57017
E-Mail: dsj@post.olivat.fo

UNGMANNABALL Í HÚSAVÍK
Um undirtøkan verður nóg stór, verður Ungmannaball í Húsavík leygardagin 31. jan. Tekning á tlf. 61780, 61667 ella 61477

TIL SØLU
Nyggir Nordica Slalom skíðstyvlar, std. 44-45, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 10215

HØLL Á ARGJUM TIL LEIGU
100 kvm. høll, vælegnað til smáídnað, goymslu v.m., bíliga til leigu
Tlf. 17580

FERÐASEÐIL TIL DK YNSKIST
Er nakar, ið hevur ein bíligan ferðaseðil Føroyar-DK aftur & fram (ella eingvegis), niður áðrenn 7. febr., heim eftir 8. febr.?
Tlf. 24044, eftir kl. 17

FLØDAKRUSS
Sóknast verður eftir fløðakrússi av jólastellinum hjá Bing og Grøndahl, teknað av Harald Viberg. Um tygum vilja selja hetta, vinarliga ring
Tlf. 14319

TIL SØLU
Nyggjar stálketur til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 10352

KIOSK Í VÁGI
Kioskin á Marknoyri til leigu frá 1. mars. Hoyr nærri á
Tlf. 73169

YNSKIST
Úthurð ynskist bíliga til keyps
Tlf. 14425

YNSKIST
Takvindeyga, úthurð, tvey vindeygu og tveir radiatorar ynskist til keyps
Tlf. 48001

TIL SØLU
Facit 7800 skrivimaskina í sera góðum standi til sølu
Tlf. 19535

TIL SØLU
Kärcher industridustsúgvari til sølu fyri 800 kr. Tekur bæði turt og vátt, sær út sum nýggjur.
Tlf. 17414

HITABLÁSARI
12 V hitablásari til bát/bil ella buss til sølu fyri 800 kr. Skal tilsluttast kølivatnið
Tlf. 17414

VERTSFAMILJUR
Har sum hjartarúm er, er eisini húsrúm. Gerst vertsfamilja hjá einum umskiftisnæmingi
AFS-Føroyar
Tlf. 10597, 13438, 16164

GRINDAKNÍVUR TIL SØLU
Avbera vakur grindaknívur, gjørdur úr føroyskum ahorn, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 17414

TIL SØLU
Brúkt kassaapparat til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 84722 / 17226

TIL SØLU
Lítið brúkt telefax til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 84722 / 17226

TIL SØLU
Exhausto útsúgvari til sølu fyri 3.500 kr. Hevur trinleysa regulering, sera vælegnaður til brenniovn ella peis. Fabriksnýggjur. Ongantíð brúktur.
Tlf. 17414

ÚT AT FERÐAST VIÐ AFS
Eitt ógloymandi skúlaár í útlondum. Norðuramerika, Suðuramerka, Australia, Afrika, Asia, Europa v.m.
Ring
AFS, tlf. 14855, 14123, 13837

TIL SØLU
Brúktar, útskornar, eik skápshurðar til køk bíliga til sølu. Ymiskar støddir.
Tlf. 44103

Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan, við heimild í §26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 §1, stk. 4 hevur veitt umhvørvisgóðkenning til:

»Kaldbaks Laksaaling«

til aling á Kaldbaksfirði.

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya Landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Debesartrøð, 100 Tórshavn í seinasta lagi 4 vikur frá dags dato.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Bjargingar- og neyðútgerð
Bjargingarbelti
Bjargingarvestar
Bjargingarkransar
Flótidraktir
El. vatnljós
Fallskýrakettir
Hondbluss

Vit kunnu eisini útvega bjargingarbátar

P.f. Kaj Andreasen & Co.
Klingran 5 • 188 Hoyvík
Tlf. 15600

Túnatos og sleyg – ella sjón fyri søgn

Danir mugu ikki kritiserast
14. apríl í fjør hevði Rolf Guttesen eina grein í blaðnum, har hann leggur VMF og undirritaðu undir at byggja politisku metingar okkara á túnatos og sleyg.

Rolf Guttesen var ógvuliga forargaður yvir, at vit dittaðu okkum at siga, at danska forsætismálaráðið hevði misrøkt sínar skyldur móti føroyska fólkinum, og at vit ikki hildu okkum kunna hava álit á donskum politikarum.

Sannleikin illa lýddur
Vit í VMF vóru ikki einsamøll við sjónarmiðinum um leiklutin hjá dønum í føroyska kreppumálinum. Tey, ið høvdu eygu og oyru opin og tímdu at leggja tvey og tvey saman, høvdu eina hylling av støðuni, men tað kann tykjast troystarleyst í einum samfelag, har størsti parturin av fjølmiðlunum og lærd fólk sum Rolf Guttesen kenna tað sum sítt kall at avnokta veruleikan.

Sjón fyri søgn
Nú eru so prógvini komin á borðið. Skjøl í rúgvuvís, og stóra tøkk fái SvF og teir, ið hava gjørt sendingarnar um bankamálið og føroysku kreppuna.

Hóast ein helt seg vita, hvat hevði gingið fyri seg, so var tað kortini skelkandi at síggja, hvussu grovir og útspekuleraðir donsku politikararnar og embætisfólk teirra eru.

Tað, at okkara egnu politikarar hava sínar meira og minni ullintu leiklutir í hesum spæli, fríkennir ikki donsku myndugleikarnar fyri teirra misgerð móti føroyska fólkinum.

Oljuvinnan næsta føllan
Á sama hátt sum vit vóru fleiri, ið dugdu at síggja, at bankabjargingarnar vóru grov útnyttan av føroyska skattgjaldaranum, so eru í dag eisini fleiri, ið duga at síggja, hvat endamálið við føroysku oljuvinnuni er. Hví hon skal trýstast ígjøgnum, áðrenn føroyska samfelagið fær tíð at gera seg klárt til hesa avbjóðing.

Frá tí degi (11. sept. 92) at Schluter gav føroyingum loyvi til at vinna ráevni úr okkara egnu undirgrund, hevur danska stjórnin strongt á, fyri at fáa eina oljuvinnu í gongd í Føroyum.

Hetta er gjørt samstundis sum teir koyrdu okkum á botn fíggjarliga. Møguliga fyri at gera áhugan fyri oljuvinnui størri.

Donsk serfrøðingahjálp
Í samrøðu við Sosialin 5. mars í 97 sigur Jørgen Nørgaard, limur í danska orkumálaráðnum, at í avtaluni frá 1992 var ein grein, sum segði, at føroyingar skuldu hava møguleika at brúka danska ekspertisu.

Fyri at fáa gongd á, varð hann so boðin av føroyingum til at hjálpa við at fyrireika oljuvinnuna í Føroyum. Jørgen Nørgaard hevur luttikið í øllum fyrireikingararbeiðinum í føroysku oljuráðleggingarnevndini, og sigur Jan Muller hann vera høvuðsarkitektin aftan fyri uppskotið til føroysku kolvetnislógina.

Jørgen Nørgaard viðgongur, at hann hevur kunnað bæði danska forsætismálaráðið og Færøgruppen um gongdina við arbeiðinum í føroysku oljuráðleggingarnevndini.

Hesa tíðina Jørgen Nørgaard hevur arbeitt í Føroyum, hevur hann verið løntur av danska orkumálaráðnum.

Jørgen Nørgaard hevur gjørt sítt arbeiði í Føroyum. Kolvetnislógin er klár at viðtaka, og fjølmiðlar bera tey tíðindi, at politikarar eru samdir um, at lógaruppskotið er eitt vælaverk.

Alt vald til løgmann
Í uppskotinum til kolvetnislógina stendur, at landsstýrið ella landsstýrismaðurin, ið umsitur oljumál, avger hvørji økir verða bjóðað út og ásetir reglur og treytir eisini um skatt og avgjøld, ið fylgja við leitingarloyvunum.

Áðrenn hvørt útbjóðingarumfar skal landsstýrið leggja frágreiðing um ætlanina fyri løgtingið.

Í viðmerkingunum til kolvetnislógina verður sagt, at tá tað ikki er skotið upp, at løgtingið ella ein løgtingsnevnd skal góðkenna frágreiðingina, er tað fyrst og fremst av tí at hetta helst hevði verið ímóti ætlanunum við stýrisskipanarlógini pr. 34.

Løgtingslimir sleppa at siga sína hugsan um frágreiðingina, men landsstýrismaðurin avger sjálvur, um hann rættar seg eftir løgtinginum.

Hvat fær landskassin?
Tað, sum fleiri fólk sóknast eftir er, hvat fær landskassin og hvat fær Føroya fólk burtur úr oljuvinnuni?

Eitt vanligt orð í sambandi við oljuvinnu, sum vit lítið hava hoyrt til í Føroyum, er orðið »royalty«. Tað merkir framleiðsluavgjald, sum oljufeløgini gjalda til landið, tey vinna olju hjá.

Hetta avgjald er ymiskt, alt eftir hvussu trupul oljan er at fáa fatur á. Í arabisku londunum hevur hetta avgjald verið uml. 50% av virðinum av upptiknu oljuni. Í Danmark er hetta tal í meðal 8,5%, í Noreg verður royalty roknað eftir einum skala frá 8 til 16%. Umframt royalty gjalda oljufeløgini frá 30 til 50% í partafelagsskatti til landið, ið eigur oljukeldurnar

Harafturat koma so aðrar inntøkur til londini í sambandi við økt virksemi í landinum.

Eftir einum dømi í frágreiðingini frá oljuráðleggingarnevndini fær landskassin í alt við øllum avgjøldum, skatti av tænastum o.ø. 12,8% av virðinum av upptiknu oljuni.

Eitt dømi frá norska Statfjordfeltet gevur norska statinum 66% av virðinum av upptiknu oljuni. Tað er munur á.

Men alt hetta verður avgjørt av teimum, ið geva leitingar- og framleiðsluloyvini og ráðgevarum teirra.

Oljuvinnu fyri hvønn?
Oljan í undirgrund okkara hevur møguliga virði fyri hundraðtals milliardir. Tað skuldi verið nokk at goldið skuldina til Danmarkar við, umframt at verið ein góður stuðul til føroyska fólkið 50-100 ár fram í tíðina, um ikki politikarar okkara lata hana fyri lítið og lætt til DONG, DOPAS, A. P. MØLLER, BP, SHELL, AMERADA HESS ella onnur oljufeløg, ið vilja hava olju okkara, helst fyri onki.

Alis Jacobsen, landsformaður í VMF

BILLUTIR
útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR

Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666

sosialurin

www.sosialurin.fo